## UTTAN ÚR HEIMI



*Hendan kvinnan misti tvey av sínum næstu í atsóknini at bussinum.*

# Ein skilaleys brotsgerð

**Myndugleikarnir í Sri Lanka og ST ivast ikki í, at tað vóru teir tamilsku tikararnir, sum sprongdu ein buss í luftina fyrradagin. 64 fólk, teirra millum 15 skúlabørn, doyðu.**

Sri Lanka
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tey, sum kenna mannagongdina hjá teimum tamilsku tikarunum, eru ikki í iva um, at tað vóru teir, sum skipaðu fyri hesum ræðuliga hópmorðinum - hesari skilaleysu brotsgerðini, sigur srilankiski uttanríkisráðharrin, Mangala Samaraweera, við norska blaðið Dagsavisen.

Álopið á tann fullsetta bussin nærhendis býnum Kebitigollewa er tann ringasta atgerðin, síðani stjórnin og teir tamilsku tikararnir samdust um vápnahvíld í 2002. Teir norðurlendsku eygleiðararnir, sum skulu halda eyga við vápnahvíldini, vóru skjótir á staðið, og teir eru heldur ikki í iva um, hvør hevði lagt tær báðar minurnar á vegin. Jouni Suninen úr Finnlandi stendur á odda fyri eygleiðarunum, og hann sigur við finsku tíðindastovuna FNB, at tað er neyvan nakar ivi um, at tað vóru teir tamilsku tikararnir.

### Stálkúlur

– Talan var um tvær sterkar minur. Tær vóru fyltar við stálkúlum og vórðu sprongdar, júst tá bussurin fór framvið, sigur Jouni Suninen við FNB.

Teir tamilsku tikararnir hava avsannað, at teir høvdu nakað við tilburðin at gera, men eygleiðarar vísa á, at tikararnir átaka sær ongantíð ábyrgdina av slíkum atsóknum. Uttanríkisráðharrin er ikki í iva.

– Tað er bara LTTU (tamilski uppreistrarherurin), sum hevur førleika og útgerð til at fremja eina slíka atsókn, sigur Mangala Samaraweera, sum heldur, at altjóða samfelagið eigur at draga uppreistrarleiðaran, Velupillai Prabhakaran, fyri krígsbrotsmannadómstólin í Haag.

# Fólk savnast í stórbýum

**Um eitt ár verða fleiri stórbýarfólk enn bygdafólk í heiminum, og tað elvir til stórar trupulleikar.**

Búseting
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Um eitt lítið ár fara tríggjar milliardir fólk at búgva í stórbýum, og tað er fyrstu ferð í søguni, at fleiri búgva í bý enn á bygd, sigur ST.

Men heimsfelagsskapurin ávarar ímóti gongdini, tá nógvastaðni er miðsavnanin óskipað, og tað kann enda við harðskapi og ruðuleika.

– Megna vit ikki at hjálpa teimum mongu milliónunum, sum savnast í fátækrabýlingunum í stórbýunum, endar tað við, at tey gera uppreistur og taka valdið, sigur ST-talskvinnan Anna Tibaijuka.

– Skulu vit sleppa undan ruðuleika, mugu vit geva teimum fátæku rættindi og ávirkan, leggur hon afturat.

Ringast stendur í teimum afrikonsku londunum sunnan fyri Sahara. Meiri enn tveir triðingar av teimum, sum búgva í stórbýunum har, fluttu til býirnar fyri at fáa betri livikor, men liva nú í stórum fátækradømi, og gerandisdagurin er merktur av neyð, sjúku og harðskapi. Tey hava tað verri nú, enn tá tey búðu á bygd.

# Vandamikið at hyggja eftir kvinnum

Í fjør vóru 115.000 ferðsluóphapp í suðuramerikanska landinum Kolombia, og myndugleikarnir hava nú kannað, hví talið er so stórt. Undir kanningunum eru teir komnir eftir, at fimta hvørt óhapp kemst av, at bilførarar tosa í fartelefon, men tað hevur vakt størri ans, at fimm prosent av óhappunum standast av, at menn hyggja eftir kvinnum, meðan teir koyra bil.

– Vit hava okkara egnu mentan, og ein partur av henni er, at menn hyggja at tí, teir halda vera vakurt, sjálvt um tað fær teir at gloyma, at teir koyra bil, sigur Fransisco Fernandez, sum hevur kannað hagtølini.

Kolombisku myndugleikarnir hava gjørt nógv burtur úr at bøta um viðurskiftini í ferðsluni, og tað hevur eisini hjálpt. Fyri bara fáum árum síðani vóru umleið 200.000 ferðsluóhapp har um árið, men nú er talið komið niður ímóti tí hálva. Um tað er tí, at menn hyggja minni eftir kvinnunum, sigur søgan kortini einki um.

## STUTT SAGT



### Funnið olju og gass

Norska oljufelagið Statoil kunngjørdi í gjár, at felagið hevur funnið eina nýggja oljuleið á Haltenbankanum og eina nýggja gassleið nærhendis Kvitbjørn-leiðini í Norðsjónum.

Tim Dodson, sum hevur ábyrgdina av leitingini hjá Statoil, sigur við Aftenbladet, at enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógv olja og gass eru á teimum báðum leiðunum. Hann heldur kortini, at tað fer at løna seg at útvinna oljuna og gassið, men at leiðirnir møguliga skulu knýtast upp í aðrar leiðir, har framleiðsla longu er.

Statoil eigur 43,55 prosent av rættindunum til nýggju oljuleiðina á Haltenbankanum og 50 prosent av gassleiðini við Kvitbjørn-leiðina.

### Bush bað um umbering

Amerikanski forsetin, George W. Bush, noyddist nú um dagarnar at ringja til ein blaðmann hjá Los Angeles Times við einari umbering.

Á tíðindafundum sínum roynir forsetin við hvørt at skemta, men á einum tíðindafundi herfyri mistók hann seg, tá ein blaðmaður við sólbrillum reistist og setti forsetanum ein spurning. Bush spurdi, hví hann ikki tók brillurnar av, áðrenn hann setti sær spurningin, tí har var eingin sól.

Forsetin visti ikki, at blaðmaðurin, sum eitur Peter Wallsten, hevur eina eygnasjúku, sum ger, at hann noyðist at ganga við sólbrillum. Tað fekk hann at vita seinni, og dagin eftir tók Bush telefonina og bað blaðmannin um umbering.

– Eg eri ikki illur inn á hann. Men tað argaði meg, at hann svaraði ikki spurninginum, sum eg setti honum, sigur Peter Wallsten við AP.

### Tey flestu eru innflytarar

Tey seinastu tíggju árini er fólkatalið í Oslo vaksið 50.000, men hagtølini vísa, at tað eru bara 4.000 fleiri norðmenn í býnum nú enn fyri tíggju árum síðani. Hini 46.000 eru innflytarar ella fólk av fremmandum uppruna.

Tøl hjá kommununi vísa, at 92,5 prosent av teimum nýggju íbúgvunum í Oslo eru av fremmandum uppruna, og at sjey prosent av teimum eru úr ymsum londum í Vesturheiminum. Geir Thornæs, sum er ráðgevi hjá Oslo kommunu, sigur, at uttan fremmandafólkini var fólkatalið í Oslo minkað, og í besta føri hevði tað staðið í stað, sigur hann.

Hann og politikararnir í býráðnum høvdu ikki væntað, at tey fremmandu eiga ein so stóran part av vøkstrinum í Oslo. Geir Thornæs sigur, at fleiri fremmandafólk eru flutt úr øðrum norskum býum til Oslo tey seinastu árini, samstundis sum fleiri eru komin úr útlandinum. Harafturat kemur, at tær fremmandu kvinnurnar fáa fleiri børn enn tær norsku.